# Reglugerð um farloyvi til lesandi á Fróðskaparsetri Føroya

ásett við heimild í § 13, stk. 1 í kunngerð nr. 98 frá 17. juni 2021 um upptøku til lestur á Fróðskaparsetri Føroya við seinni broytingum

Henda reglugerð er galdandi fyri lesandi, sum fara í farloyvi lestrarárið 2024/2025 ella seinni.

Higartil galdandi reglur um farloyvi, ásettar aðrastaðni enn í lóggávu, fara samstundis úr gildi.

Lesandi, sum longu eru í farloyvi, tá henda reglugerð fær gildi, skulu tó framhaldandi viðgerast eftir higartil galdandi farloyvisreglum.

## 1. Endamál

Lestrarfarloyvi gevur einum lesandi á Fróðskaparsetri Føroya møguleika til at hava ein frammanundan ásettan tíðaravmarkaðan steðg í útbúgvingartilgongdini, uttan av teirri orsøk at skula gevast ella verða útskrivaður frá útbúgvingini.

## 2. Grundleggjandi farloyvistreytir

Lesandi, ið eru innskrivað til lestur á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu søkja um farloyvi frá lestrinum í styttri ella longri tíðarskeið.

Lesandi kunnu ikki fara í farloyvi, meðan tey skriva bachelorverkætlan ella masterritgerð. Tó ber til at fáa longda freist at lata verkætlanina/ritgerðina inn, um talan er um barnsburð ella sjúku.

Lestrarfarloyvi er treytað av, at tann lesandi eftir lokið farloyvi kann halda fram við lestrinum, har viðkomandi slepti, ella fylgja eini tillagaðari lestrarætlan, sum er góðkend av Lestrarskrivstovuni.

## 3. Ógrundað farloyvi

Lesandi, ið eru innskrivað til útbúgving á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu søkja um ógrundað farloyvi frá lestrinum í tilsamans 12 mánaðir fyri hvørja útbúgving. Til útbúgvingar, har upptøka ikki er á hvørjum ári, kann farloyvistíðarskeiðið játtast longur enn 12 mánaðir, um hetta er neyðugt fyri, at tann lesandi eftir lokið farloyvi kann halda fram við lestrinum, har viðkomandi slepti.

Treyt fyri at fáa ógrundað farloyvi er, at tann lesandi hevur staðið 60 ECTS á bachelorstigi ella 30 ECTS á masterstigi á útbúgvingini, viðkomandi er innskrivaður til, og at tann lesandi ikki er afturúr í lestrinum, tá søkt verður um farloyvi.

Ógrundað farloyvi verður roknað sum lestrartíð, og tískil verður játtaða farloyvistíðarskeiðið talt við í mest loyvdu lestrartíðina fyri avvarðandi útbúgving.

## 4. Grundað farloyvi

Lesandi kunnu søkja um grundað farloyvi í niðanfyri nevndu førum:

| | |
|---|---|
| Sjúka ella diagnosa hjá tí lesandi | Talan er um sjúku ella diagnosu hjá tí lesandi, sum hevur við sær, at tann lesandi í styttri ella longri tíðarskeið ikki er likamliga og/ella sálarliga før/ur fyri at vera virkin lesandi.<br>Læknaváttan skal leggjast við umsóknini, har upplýst verður, hvussu leingi sjúkan verður mett at vara. |
| Barnsburður og ættleiðing | Lesandi, ið gerast foreldur, kunnu sum útgangsstøði fáa barnsburðarfarloyvi í upp til 12 mánaðir.<br>Avrit av váttan um, nær mettur føðidagur er, ella ættleiðingarskjøl skulu leggjast við umsóknini. |
| Aðrar serstakar umstøður | Her er talan um viðurskifti, sum gera, at tann lesandi ikki megnar at vera virkin lesandi, t.d. álvarslig sjúka ella andlát í nærmastu familju og onnur persónlig viðurskifti, sum t.d. hjúnaskilnaður. Ítøkiliga støðan skal lýsast í umsóknini um farloyvi. |

Grundað farloyvi verður ikki roknað sum lestrartíð og verður sostatt ikki drigið frá mest loyvdu lestrartíðini fyri avvarðandi útbúgving.

## 5. Umsókn um farloyvi

Umsókn um lestrarfarloyvi skal latast Lestrarskrivstovuni. Saman við umsóknini skal liggja uppskot til lestrarætlan fyri, hvussu tann lesandi tekur lesturin upp aftur og kann fullføra lesturin innan ásettar freistir. Verður søkt um grundað farloyvi, skal harumframt eisini viðleggjast nærri frágreiðing og møguligt skjalprógv fyri umsóknini um grundað farloyvi.

Umsóknarblað til farloyvi er á heimasíðuni setur.fo.

Verður umsókn um farloyvi ikki gingin tí lesandi á møti, skal avgerðin grundgevast og hava kæruvegleiðing.

## 6. Avleiðingar av at fara í farloyvi

Fróðskaparsetur Føroya kann ikki geva lyfti um, at tann lesandi uttan avbjóðingar kann taka upp aftur lesturin eftir endað farloyvi. Tað er ábyrgdin hjá tí lesandi frammanundan at kunna seg um, hvørjar møguligar avleiðingar eitt farloyvi hevur fyri lesturin hjá viðkomandi. Ivast ein lesandi, kann viðkomandi venda sær til lestrarvegleiðara ella útbúgvingarleiðan.

Í farloyvistíðarskeiðinum hevur tann lesandi ikki krav uppá at fara til próvtøkur, lata inn uppgávur ella fáa vegleiðing í hesum sambandi. Undantak kann tó gerast, tá tað er ein fortreyt fyri, at tann lesandi kann taka upp aftur lesturin eftir endað farloyvi, at viðkomandi fer til próvtøku ella letur inn uppgávu. Tann lesandi kann heldur ikki vera virkin í lestrarráðum í farloyvistíðarskeiðinum.

## 7. Parttíðarlesandi í farloyvistíðarskeiðinum

Lesandi, ið fara í barnsburðarfarloyvi, kunnu søkja Lestrarskrivstovuna um at vera parttíðarlesandi í farloyvistíðarskeiðinum, um bygnaðurin á útbúgvingini loyvir hesum, og tað er møguligt hjá tí lesandi uttan trupulleikar at fara undir fulltíðarlestur, tá farloyvistíðarskeiðið er av.

## 8. Annar lesnaður á Setrinum í farloyvistíðarskeiðinum

Lesandi, ið eru í farloyvi frá einari útbúgving á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu ikki fara undir aðra útbúgving á Fróðskaparsetrinum í farloyvistíðarskeiðinum. Ger ein lesandi hetta, verður tað roknað sum útskriving frá útbúgvingini, ið viðkomandi er í farloyvi frá.

## 9. Fráboðan til Studna um farloyvi

Lesandi hava sjálv ábyrgd av at avgreiða stuðulsviðurskiftini við Studna í sambandi við barnsburðarfarloyvi. Oyðubløð eru at finna á heimasíðuni hjá Studna www.studni.fo. Lestrarskrivstovan váttar vegna Setrið á umsóknarblaðið hjá tí lesandi.

Er talan um annað slag av farloyvi enn barnsburðarfarloyvi, boðar Lestrarskrivstovan Studna frá.

## 10. Longt farloyvi

Lesandi, sum vegna sjúku ella av øðrum serligum orsøkum ikki meta seg før fyri at fara undir lestur, tá upprunaliga ásetta farloyvistíðarskeiðið er runnið, kunnu søkja um at fáa farloyvið longt.

Treytir og mannagongdir í sambandi við umsókn um longt farloyvi eru tær somu, sum tá søkt varð um upprunaliga farloyvið.

## 11. Framhald av lestrinum eftir endað farloyvi

Tá lesandi fáa játtað farloyvi, fáa tey samstundis álagt eina freist fyri, nær tey í seinasta lagi skulu boða Lestrarskrivstovuni frá, at tey taka lesturin upp aftur sum ætlan eftir endað farloyvi. Boðar tann lesandi ikki rættstundis frá, at viðkomandi ætlar at taka lesturin upp aftur, so setur Lestrarskrivstovan seg í samband við viðkomandi.

Letur tann lesandi ikki við seg koma, ella byrjar tann lesandi ikki lestur eftir endað farloyvi, so verður ætlanarskriv um útskriving sent viðkomandi.

Avgerð um útskriving skal hava nøktandi grundgeving og kæruvegleiðing.

## 12. Fráboðan til Studna um uppafturtøku av lestrinum eftir farloyvi

Lesandi, sum taka lesturin upp aftur eftir barnsburðarfarloyvi, skulu sjálv boða Studna frá hesum. Oyðublað er at finna á heimasíðuni hjá Studna. Lestrarskrivstovan váttar vegna Setrið á umsóknarblaðið hjá tí lesandi.

Er talan um annað slag av farloyvi enn barnsburðarfarloyvi, boðar Lestrarskrivstovan Studna frá.

## 13. Kærur

Avgerðir viðvíkjandi farloyvi kunnu kærast til landsstýrismannin innan 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað.

Kæra verður skrivliga send til Lestrarskrivstovuna á Fróðskaparsetri Føroya, ið sendir kæruna víðari til landsstýrismannin saman við sínum ummæli av málinum.

Áðrenn málið verður sent landsstýrismanninum, skal gevast kæraranum høvi til innan 7 dagar at gera viðmerkingar til ummælið, og møguligar viðmerkingar kærarans skulu eisini sendast landsstýrismanninum.

***Henda reglugerð er viðgjørd og góðkend av setursleiðsluni 12. mars 2024.***